HB hevur fingið fult og KÍ hevur einki fingið

Tað gongur ongan veg hjá klaksvíkingum at koma burturúr tøvingini, sum teir vóru plágaðir av í fjør. HB skinklaði í fjør, men nú gongur strúkandi hjá teimum

SAMANUMTØKA
Jóannes Hansen

Eugen Voda er hægstur í brotsteiginum og fangar bóltin frammanfyri Jákupi á Borg og John Petersen. Skála snýtti B36, tá tað eydnaðist at javna móti endanum av dystinum

Mynd: Finnur Justinussen

Annað umfarið í landskappingini í 1. deild var á skránni hósdagin. Í dag verður annað um farið í 2. deild á skránni. Tað venda vit aftur til týsdagin. Tvey umfør eru spæld í 3. deild. Vit hava einki gjørt burtur úr 3. deild enn. Vit ætla at gera eitt sindur burturúr. Tað venda vit aftur til mitt í komandi viku.

Støðutalvan vísir, at HB er einasta felagið, sum hevur fingið fulla úrtøku burturúr tveimum teimum fyrstu umførunum. Støðutalvan vísir eisini, at KÍ hevur fingið soltnastu úrtøkuna. Tað er kanska ikki rætt at tosa um úrtøku hjá KÍ, tí teir hava einki stig fingið enn, og KÍ er aftast.

Bæði hjá HB og hjá KÍ gekk tað illa í fjør. Hvørki liðið var við í kappingini um heiðursmerkin í. Hesi bæði feløgini eru tey einastu, sum hava verið í bestu deildini øll árini, sum tað hevur verið kappast. Tey hava vunnið FM oftast, og tí var tað sjálvsagt ikki sambært tí, sum feløgini ynskja og ætla sær, tá tey í fjør komu so illa frá tí.

HB venjarin fór úr starvi síðsta heyst, men hann kom skjótt í aftur heita sessin. Har er hann framvegis, og tað gongur fínt. Um venjarin hevði havt verið skiftur út í fjør og ein annar venjari hevði havt ábyrgdina í ár, so hevði tað ivaleyst verið nevnt sum ein av orsøkunum til, at gongdin er so nógv øðrvísi nú.

Í fjør ljóðaði fleiri ferðir, at Tomislav Sivic skuldi frá sum venjari hjá KÍ. Trýstið á venjaran var stórt í Klaksvík, og tað var illa dámt, at nevndin helt hondina yvir venjaranum. Sáttmálin við Tomislav Sivic varð ikki endurnýggjaður. Nýggjar leiðir skuldu roynast. Kurt Mørkøre tók á seg at standa á odda fyri liðnum, sum hann á vøllinum hevur vunn ið so nógvar sigrar fyri. Higartil hevur úrtøkan ikki verið góð. KÍ slapp ikki víðari úr bólkaumfarinum í steypakappingini, og KÍ hevur einki stig fingið í tveimum teimum fyrstu umførunum í landskappingini.

Kurt Mørkøre eigur stóra virðing fyri sini fótbóltsavrik millum klaksvíkingar og norðoyingar. Kredítturin er nevyan brúktur, og tað er komið fyri áður, at KÍ í sama kappingarári bæði hevur tapt á heimavølli ímóti B36 og á útivølli ímóti HB. Men tað er einki at siga til, at KÍ, Kurt og klaksvíkingar leingjast nógv eftir, at tað skal venda. Tað man vera langt síðani, at tað er komið fyri, at KÍ hevur verið niðast á støðutalvuni, og tað er enn ongantið komið fyri, at teir hava verið aftastir, tá kappingarárið er lokið.

Um eina viku kemur TB til Klaksvíkar. Um KÍ ikki fær trý stig burturúr tí uppgerðini, so verður tað í hvussu so er rímuligt at tosa um kreppu. Sigur á TB fer at kennast um góður fløvi, men tað skal nógv til, at KÍ verður at finna har, sum teir fegnir vilja vera – í kappingini um heiðursmerkini og Europa Cup plássini.

Flúgvandi HB

Í fjør stóð einki til, tá KÍ fór til Havnar at spæla ímóti HB. Klaksvíkingar vunnu ta ferðina 2–1. Tá bar til at staðfesta, at tað stóð uppaftur verri til hjá HB, enn tað gjørdi hjá KÍ.

HB stóð seg væl í bólkaumfarinum í steypakappingini í fjør. Men so gekk illa. Í ár stóðu teir seg væl í bólkaumfarinum, men síðani hevur gingið væl. Jan C. Dam ætlaði sær at trappa niður, tá hann í fjør fór av Toftum. Tað hava teir í HB ikki verið samdir við honum í, og botnurin í HB liðnum er nú ein trygg verja við sera nógvum royn dum. At verjan er trygg og góð hevur við sær, at Jón Rói Jacobsen kann brúkast frammi á vøllinum. Har eru hann Uni Arge og Andrew av Fløtum sera hvassir. Hvørki Uni ella Andrew vóru tøkir, tá tað í fjør gekk illa.

Nógvir ósvaraðir spurningar

Burtursæð frá at tað gongur strúkandi hjá HB, og at tað gongur illa hjá KÍ, hava úrslitini í teimum báðum fyrstu umførunum ikki boða frá nakrari eintýðugari gongd. B36 hevur ikki tapt, men teir síggja ivaleyst javnleikin á Skála sum meiri enn hálvan ósigur. VB kiksaði í fyrsta útidystinum ímóti TB. Nú vunnu teir á útivølli. EB/Streymur vann fyrst á heimavølli ímóti Skála, og so taptu teir ímóti VB.

TB sigurin á VB kundi boða frá, at tvørámenn eru sera væl fyri. Men stóra tapið ímóti B68 kundi bent á, at tað heldur vóru serligu viðurskiftini, sum altið gera seg galdandi, tá VB og TB hittast, enn tað var so mikið sannførandi TB lið, at teir kundu gera, at B68 kom í trupulleikar.

Komandi vikuskifti verður spælt soleiðis: B68–EB/Streymur, KÍ–TB, B36–HB, GÍ–Skála og VB–NSÍ. KÍ er einsta liðið, sum ikki hevur fingið stig, og HB er einasta liðið, sum hevur fingið fult stigatal. GÍ og Skála hava ikki roynt at vinna, og B36 hevur ikki tapt í tveimum teimum fyrstu umførunum.

B36 hevur tapið í fjórðingsfinaluni at hevna ímóti grannunum, og í B36 vita teir eisini, at um HB vinnur, so er munurin upp til grannarnar vorðin alt ov stórur.

HB-KÍ 4-1 (2-0):

HB er ikki at koppa

Havnarliðið vann lættliga á klaksvíkingum Kristi Himmalferðardag. HB hevði tamarhald á dystinum frá fyrsta bríksli, og sigurin var ikki ov stórur. HB er einasta liðið við fullum stigatali, meðan KÍ er einasta liðið við ongum stigi

FÓTBÓLTUR
Stefan í Skorini

Hjalgrím Elttør hevur gott tak á Rúna Nolsøe. Annars var tað heldur hinvegin, tí HB vann sera sannførandi á KÍ í Gundadali hósdagin

Mynd: Álvur Haraldsen

HB sýndi enn einaferð, at liðið er ógvuliga væl fyri og hevur tað,ið skal til fyri at gerast meistarar. Hósdagin sendu teir KÍ av vøllinum við einum eyðmýkjandi 4-1 tapi, og sigurin var ikki eitt mál ov stórur.

HB hevði tamarhald á dystinum frá byrjan til enda, og tá tekur blaðmaðurin ikki munnin ov fullan. Longu áðrenn fimm minuttir vóru á stadionurinum hevði Jón Rói Jacobsen lagt HB framum.

Hann var sendur avstað í vinstru síðu, og KÍ-verjan megnaði ikki at fylgja við. Hann gjørdist leysur við Meinhardi í málinum, og tann ungi framherjin trillaði bóltin framvið málverjanum. HB hevði tá lagt tónan fyri allan dystin.

HB liðið var frá byrjan av grammari, og viljin at vinna tóktist størri hjá heimaliðnum enn hjá gestunum. Stutt eftir fyrsta málið hevði Rúni Nolsøe eina góða royndmóti málinum. Jón Rói legði útfrá til liðformanninum, men skotið varð væl bjargað av málverjanum.

Uni økir

KÍ megnaði ongantíð steðga tí ágangandi álopsspælinum hjá HB. Ferð eftir ferð sluppu HB-leikarar ígjøgnum, og verjan megnaði einki at gera við tað. Uni Arge var nær við at skora lítla løtu eftir fyrsta málið. Andrew av Fløtum sendi ein bólt innfyri, og Uni Arge var hægstur og setti høvdi á bóltin, men Meinhard fekk tað uttarsta av fingrunum á bóltin, sum brast á tvørstongina.

Uni Arge økti tó til 2-0, tá góðir tjúgu minuttir vóru leiktir. Rúni Nolsøe fór avstað í høgru síðu og fekk ein bólt oman á baklinjuna. Hann sendi ein góðan bólt innfyri, sum fór uppum málverjan og við handaru stong kundi Uni Arge seta høvdið á bóltin og økja um leiðsluna. Rúni Nolsøe spældi væl á miðvøllinum hjá HB. Hann orkar væl, og hann sást allastaðni á vøllinum.

Tú hevði eina kenslu av, at KÍ-ararnir longu nú vóru falnir í fátt. Kí fekk enn eitt skot fyri bógvin, tá Allan Joensen mátti av vøllinum við einum vøddaskaða beint eftir málið til 2-0.

HB fekk enn ein møguleika, tá Andrew av Fløtum slapp at leysur oman móti málinum. Hann royndi at leggja tvørturum til Una Arge, men Meinhard var vakin og fangaði bóltin.

Tað var ikki fyrr enn móti endanum av fyrra hálvleiki, at KÍ fór at bíta frá sær. Erling Fles fekk tann besta møguleikan hjá KÍ. Allan Mørkøre royndi seg við beinleiðis frísparki, um rakti ein HB-leikara. Bólturin datt fyri føturnar á Erlingi, sum stóð væl fyri tætt undir málinum. Hann rakti tó ikki bóltin væl, og hann fór langt uppum.

Eisini Hjalgrím Elttør royndi seg við einum skoti frá brotsteigarmarkinum, men Bárður Johannesen kom væl niður og bjargaði.

Uni Arge fegnast um málið til 2-0, og Jón Rói Jacobsen, sum fekk tvey mál, er ikki minni fegin

Mynd: Álvur Haraldsen

Linligt eftir steðgin

Dysturin var at kalla avgjørdur fyri steðgin, tí eingin dugdi at síggja, hvussu KÍ skuldi hótta HB av álvara.

KÍ kom tó eitt sindur fyri seg beint eftir steðgin. Klaksvíkingar høvdu nakað av spæli, men tað eydnaðist ongantíð at spæla seg fram til teir stóru málmøguleikarnar. HB-verjan stóð stinn allan dystin. Serliga Hans á Lag spældi væl yvirfyri fyrrverandi liðfelaganum Állani Mørkøre. Hann hevði altíð ein fót fyri og var sera sterkur í luftspælinum.

Allan Mørkøre hevði eitt vandamikið innlegg, sum Jan Dam var um at beina í egið mál, og Hjalgrím Elttør hevði eisini eitt vandamikið skot, sum tó varð blokerað.

Kurt Mørkøre setti síðani seg sjálvan á vøllin nakað seinni fyri Bárð á Lakjuni, ið ikki fekk nógv burturúr, men henda útskiftingin setti ikki nakað merkisvert í gongd.

Rógvi Jacobsen møtti henda dagin gamla felagnum, og hann var nær við at skora fyrsta mál sítt í landskappingini í ár. Rúni Nolsøe legði ein góðan bólt inn í brotsteigin til Rógva, ið var púra leysur. Hóast hann hevði góða tíð, skeyt hann beint á málverjan, sum ikki kom út ímóti beinanvegin.

Eftir fleiri málmøguleikar bragdaði endiliga aftur hjá HB miðskeiðis í seinna hálvleiki. Tað var Uni Arge, sum vann bóltin eftir útspark frá málverjanum. Hann legði bóltin út til Jón Róa í høgru síðu. Hann dró móti málinum, men ístaðin fyri at skjóta, sendi hann tvørturum til Andrew av Fløtum, sum hevði eitt gapandi mál fyri sær, og so stóð 3-0 til HB.

Tað var Jón Rói Jacobsen, sum setti hol á málskjótingina, og tað var eisini hann, sum fekk síðsta málið hjá HB. Jan Dam legði ein góðan bólt inn í brotsteigin. Jón Rói snýtir hegnisliga tann fyrsta verjuleikaran og ger eina skotfintu við tann næsta. Staddur við brotssparksblettin langar hann til uttan møguleika hjá Meinhardi at bjarga.

HB hevði annars gjøgnum dystin fleiri vandamikil álop, har einki spurdist burturúr.

KÍ pyntaði tó um úrslitið, tá dysturin nærkaðist leikloki. Hjalgrím Elttør sendi eitt hornaspark innfyri. Bólturin fór uppum málverjan, og Kurt Mørkøre stóð við handaru stong og beindi bóltin inn.

Nú tveir dystir eru leiktir í landskappingini, hevur HB sum einasta lið fult stigatal. Liðið hevur skotið átta mál móti NSÍ og KÍ, og tað kundi bent á eitt meistaralið. KÍ er hinvegin einasta liðið við ongum stigi. Næsta vikuskiftið tekur KÍ ímóti TB á heimavølli, meðan HB skal spæla ímóti B36 í eini grannauppgerð.

Dysturin í tølum:

HB – KÍ 4-1 (2-0)
1-0: Jón Rói Jacobsen
2-0: Uni Arge
3-0: Andrew av Fløtum
4-0: Jón Rói Jacobsen
4-1: Kurt Mørkøre

HB: Bárður Johannesen – Jan Dam, Jóhannus Joensen, Hans á Lag, Tór-Ingar Akselsen – Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen – Andrew av Fløtum, Uni Arge, Jón Rói Jacobsen

KÍ: Meinhard Joensen – Erling Fles, Harley Bertholdsen, Allan Joensen, Aleksander Djordjevic – Allan Mørkøre, Heðin á Lakjuni, Hjalgrím Elttør, Jan Joensen – Bárður á Lakjuni, Ove Nysted